miðvikan
Nr. 146 • 05. august 2009
Siðsøguligt tilfar
í Sosialinum mikudagar

### Dagbókin hjá Egil í 1917:

# Vanlukkur og framhaldandi sjúka

**Egil Djurhuus, sum nú er 18 ár, greiðir framhaldandi frá síni sjúku men eisini um gerandisdagin í 1917, tá ið tað eisini hendu fleiri stórar vanlukkur. Framvegis fær hann nógvar vitjanir. Men fyrst fara vit til "ommu Lüt"**



**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo

**3. partur**

Í seinasta parti varð spurt hvør omma Lüt mundi vera. Hon vitjaði Egil ógvuliga dúgliga. Vit hava nú frætt frá Boga Lützen í Klaksvík, sum kann geva áhugavert ískoyti til hesa søgu.

Tað kann staðfestast, at hetta er Sigrid Maria Lützen. Hon var einkja eftir Nichels Lützen, ið doyði í 1912. Táið synirnir Andreas Christian og Svend yvirtóku eftir pápan, flutti hon til Havnar, har hon hevði pensionat.

Í Sosialinum nr. 137 er umrøða av bókini Christian Matras' brevveksling med William Heinesen og Karsten Hoydal. Eitt bræv frá Kristiani verður endurprentað í blaðnum, har hann sjálvur sigur seg búgva hjá Frú S. Lützen í Tórsgøtu.

Sigrid Maria Winther var fødd 6. mai 1847. Hetta er eisini føðingardagurin, Egil nevnir í síni dagbók. Hon hevur verið um 70 ár, tá hon vitjar Egil. Ein rættulig omma tá í tíðini. Sigrid doyði 9. januar 1929.

Bogi fekk eitt silvurbikar í konfirmatiónsgávu frá pápabeiggja og gubba sínum Bjarna Lützen. Bjarni lat navnið hjá Boga inngravera á bikarið, sum frammanundan hevði nøvnini Bjarni og Egil inngraveraði. Undir Egil stendur skrivað 13 - 9 - 98, og hetta er uttan iva dópsdagurin hjá honum. Hann var føddur 5. mai sama ár.

Bogi sigur, at hann hefti seg ikki við tað, sum bleiv fortalt á konfirmatiónini fyri 55 árum síðani, tá hann fekk gávuna. Hann má tí gita sær til, hvussu hesin lutur er handaður víðari:

Egil hevur helst fingið bikarið sum dópsgávu frá onkrum í familjuni hjá Boga. Tað kann hava verið frá abba sínum, Andreas Christian Lützen, son Sigrid og Nichels. Egil hevur so seinni latið Bjarna, ið var føddur í 1916, bikarið í dópsgávu.

Hetta er so enn ein váttan um neyva sambandið millum hesar báðar ættirnar.

Ólavur Clementsen greiðir frá í Kvørnini, at Sigrid, "omma Lüt", var ættað úr húsinum Uppi í Stovu á Sandi.

Pápi hennara var Mads Andreas Winther f. 1813, sum var sýslumaður í Sandoy. Mads Andreas var ein merkismaður. Hann var formaður í nevndini, sum frá 1867-71 virðismetti alla jørð í Føroyum. Úrslitið var tann sokallaða Taxatiónsprotokollin, sum varð endurprentað fyri nøkrum árum síðani. Mads Andreas var beiggi Niels Winther, kendur sum ein politiskur undangongumaður og útgevari av fyrsta føroyska blaðnum Færingetidende. Mamman var Súsanna Katrina Kristiansdóttir f. 1813. Tey giftust í 1842.

Nichels og Sigrid Maria Lützen áttu hesi níggju børnini:

**Eva Margretha**, f. 1871. Gift í Hvalvík, men flutti til Holbæk.

**Susanna Cathrina** f. 1873. Giftist við Mourits Vinther, sum kom at taka við handlinum eftir verpápan saman við Andreas Lützen.

**Andreas Christian** f. 1875, giftur við Hannu Julinu Niclasen úr Sørvági. Hann var eina tíð í handlinum hjá pápabeiggjanum Jákup Lützen í Havn. Fór síðan til Sørvágs, men kom so í 1913 aftur til Klaksvíkar. Ein dóttir teirra, Marianna, giftist við Cristian Matras. Ein sonur, Kjartan, minnast vit frá Kjølbro. Hann er pápi Boga, sum fekk bikarið hjá Egil. Elinborg var gift við málaranum Sámal J. Mikines.

**Mads Andreas Winther Lützen** f. 1874. Giftist við Onnu Kristinu Debes úr Havn. Var landbúnaðarráðgevi. Børn teirra vóru Leivur, kendur sum sakførari, og Sigrid, kend sum fotografur í Havn.

**Svend**, f. 1880. Giftist við Christinu Mariu Poulsen úr



*Her situr omma Lüt millum tveir ommusynir, Hans Lützen (f. 3/6 1913 sonur Svend) og Kjartan Lützen (f. 26/5 1913 sonur Andreas Christian) helst í stovu síni í Tórsgøtu. Systkinabørnini úr Klaksvík gingu í skúla í Havn, og búðu hjá ommu síni*




*Hetta er tann í greinini umrødda dópsgávan hjá Egil. Bikarið er koniskt, 85 mm høgt, diam. í neðra 38 mm, í erva 55 mm, myndin er uml. 30 mm høg*

Havn. Ein sonur var Hans, sum var varamaður á tingi, tá Hákun Djurhuus var løgmaður 1963-67.

**Rigmor** f. 1881. Kend sum "daman" hjá Janus Djurhuus, sakførara og yrkjara.

**Gunnar** f. 1884. Var hovmeistari og búði í Danmark. Var giftur men barnleysur.

**Ingeborg** f. 1887, ógift. Hon vitjaði Egil meira enn nakar annar. Hon arbeiddi alt sítt virkna lív í Føroya Banka og varð kallað Ingeborg í Bankanum.

**Christoffur** f. 1891. Giftur við Katrinu Mariu Waag úr Klaksvík. Var serliga kendur sum realskúlalærari.

## Meira um Lützenættina í Klaksvík

Tað er ikki nógv, sum er skrivað um Lützenættina í Klaksvík. Havi tó funnið minningarorð, skrivað av S.P. Zachariassen í 1952 um Svend, son ommu Lüt. Hesi lýsa hampiliga væl part av hesi ættini.

Fyrst verður víst á, hvussu ringur "heystardagurin" var hjá Svend. Tað skilst, at hann hevur drigist við sjúku.

So verður sagt: "Várdagarnir vóru ljósir og hugnaligir í barnaheiminum úti í Klaksvík hjá foreldrunum Nichels og Sigrid Lützen saman við systkinaflokkinum. Sum unglingi longdist honum út, og hann var eisini burtur í mong ár.

Sum búgvin maður kom hann aftur til heimbygdina og fekk virki her. Hann kom seinni at búgva í barnaheiminum.

Húsið hjá Svend Lützen og konuni Kristinu var altíð fargað av mentunnaratliti. Komst tú inn hjá teimum, so var hvør bókhyll rokfull, og ikki var tað lítið, ið varð lisið har í teimum longu vetrarkvøldarløtunum.

Svend sat í sóknarstýri og skúlakommissión í langa tíð. Men tað, ið mangir menn ikki vistu, var, at hann var listarmaðurin stóri. Hygg at myndum hjá honum av Kunoyargalvi ein várdag, har fannirnar liggja niðri í gilini, og tað fer at grønka í neðra samstundis við, at Kunoyar galvur speglar seg inn á Pollin og Vánna.

Vit hava eisini Svend Lützen fyri at takka, at tann ansur fyri urtagarðsfrøði, sum er í dag, er so góður, sum hann er.Vit kunnu siga um Svend, at hann átti ongar óvinir, men bert vinir, og tí vilja vit minnast hann sum ein av